# Føroyingar eru ov varnir

**Útlendingar, sum eru komnir til Føroya í samband við Bitland tiltakið, halda seg aftur við at brúka pening í Føroyum, tí føroyingar taka ikki støðu til, um teir vilja samstarva um KT loysnir, sigur KT stovan**

KUNNINGARTØKNI
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*



*Seinasta BitTingið í hesum umfarinum vaðr hildið á Hotel Føroyum hósdagin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

KT Stovan sigur, at útlendskir serfrøðingar, sum hava vitjað í Føroyum ásanna fíggjarligar og vitanarligar fyrimunir við at gagnnýta nýggja tøkni í Føroyum. Men teir eru varnir við at brúka pening her, tí føoryingar hava ikki sýnt sannførandi áhuga fyri at samstarva og gangnýta KT loysnir.

KT Stovan sigur frá, at seinasta BitTingið varð hildið á Hotel Føroyum hósdagin. Har vóru fólk við, sum høvdu havt eitthvørt samband við Bitlandverkætlanina, sum hevur vart megin partin av árinum. Fyrsta BitTingið varð hildið tann30 mai í ár.

Verkætlannarbólkurin, sum hevur sitið í samband við Bitland verkætlanina, hevur skrivað eitt álit, sum varð lagt fram á BitTinginum í gjár. Frágreiðingin hevur millum annað eitt tilmæli um, at Bitland eigur at halda fram.

Mælt verður milum annað til, at eitt smápartafelag verður stovnað, sum kann fáa í lag samband millum føroyskar og úrlendskar KT fyritøkur, sigur Steinbjørn í Dali, sum er ein teirra, ið hevur staðið fyri Bitland verkætlanini.

Hann sigur, at útlendingarnir sum so ikki eru óáhugaðir at brúka pening í Føroyum, men at teir føla, at føroyingar eru ikki til reiðar at taka í móti. Um tað er tí, at føroyingar ikki trúgva heilt upp á framkomnu tøknina, ber illa til at siga, heldur hann. Men uppgávan verður nú at fáa føroyinar til at broyta hugsunarhátt.

Á BitTingi um á Hotel Føroyum hósdagin vóru bara føroyingar, sum viðgjørdu ta 30 síðu longu frágreiðingina frá verkætlanarbólkinum, sigur Steinbjørn í Dali.

Teir skulu nú taka støðu til hvørjar uppgávur Bitland skal hava í framtíðini. Eitt nú um Bitland skal vera beinleiðis við í komandi verkætlanum ella bert skal virka sum »facilitator«. Og ikki minst hvussu farast skal fram við teimum mongu sambondunum, Bitlan hevur fingið seinasta hálva árið.









Signar á Brúnni:

# Eri ikki endaliga úti av myndini enn

**Stríðið um listan hjá Tjóðveldisflokkinum í Eysturoynni kann kyknað uppaftur. Nevndin í felagnum ger ikki meiri.**

UPPSTILLING
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*



*Enn eru ikki allar súður syftar, sigur Signar á Brúnni*

Uppstillingin til tjóðveldislistan var liðug týskvøldið, men Signar á Brúnni hevur ikki heilt givið upp enn.

Í samrøðu við útvarpið mikukvøldið segði Signar á Brúnni:

– Enn eru ikki allar súður syftar.

Í hesum liggur, at drúgvi løgtingsmaðurin og landsstýrismaðurin hjá Tjóðveldisflokkinum ikki beinanvegin leggur kongin. Tveir møguleikar eru. Annar at onkur tekur seg av listanum, so pláss verður fyri Signari á Brúnni ella at kallað verður inn til eykafund um uppstillingina.

– Eg taki ikki stig til nakað, men um so er, at fólk hava áhuga at gera nakað, so er heimild til tað í lógunum hjá Eysturoyar Tjóðveldisfelag, sigur Signar á Brúnni.

Hann sipar til, at um 15 fólk savna undirskriftir, so ber til at fáa nýggjan fund í lag.

## Svarið er ja

*– Um onkur spyr teg um tú hevði viljað, at fólk fóru at savnað neyðugu undirskriftirnar. Hvat hevði tú so svarað?*

– Svarið hevði verið ja!, sigur Signar og leggur afturat:

– Nógv er at hugsa um, áðrenn meiri verður gjørt. Átta fólk eru á listanum og øll vilja vera við. Er onkur, sum vil avaftur er tað nakað annað. Eg vil ikki trýsta nakran út, sigur Signar á Brúnni.

## Nevndin ger einki

Nevndin í felagnum ætlar einki at gera fyri at broyta uppstillingarlistan hjá Tjóðveldisflokkinum í Eysturoynni. Eingin hevur vent sær til nevndina.

– Vit hava havt atkvøðugreiðslu á fundinum og alt er farið demokratiskt fram, so nevndin ger einki, sigur Hallur Ellingsgaard, formaður í Eysturoyar Tjóðveldisfelag.

Hann sigur, at hann hevur boðað øllum nevndarlimum frá, at nevndin skal halda seg púra uttanveltaða.

– Eg havi hoyrt, at onkur arbeiðir við at fáa onkran at taka seg av listanum, men tað er bara graml. Fyri okkum er uppstillingin liðug, sigur Hallur Ellingsgaard.

## Rikið til fund

Kappingin um uppstillingina í Eysturoynni tók seg upp, tá tað ljóðaði at Signar á Brúnni og Hans Tausen Olsen ætlaðu at stilla upp.

Tórbjørn Jacobsen sá hetta helst sum ein hóttan móti sær.

Hendan støðan førdi til, at fólk fóru at reka til fundar fyri at stuðla sínum. Úrslitið gjørdist sera óvæntað, tá Signar á Brúnni endaði á aftasta plássi, tá atkvøðugreiðslan var liðug. Eina atkvøðu frá at koma á listan.

## Javnaðarlistin í Suðuroy

UPPSTILLING

Javnaðarflokkurin í Suðuroyar hevði seinasta uppstillingarfundin mikukvøldið.

Sjey fólk eru á listanum, og tey eru:

Jóannes Eidesgaard, løgtingsmaður, Tvøroyri
Rúni Lisberg, arbeiðsmaður, Sumba
Sverri Midjord, býráðslimur, Tvøroyri
Jastrid Nielsen, sjúkrasystir, Fámjin
Nita Næs, lærari, Hvalba
Henrik Old, løgtingsmaður, Vágur
Mikkjal Sørensen, stjóri, Porkeri

## Trý á fólkaflokslistanum í Vágum

UPPSTILLING

Fólkaflokkurin í Vágum stillar trý fólk upp til løgtingsvalið 20. januar.

Tey eru:
Emmy S. Joensen, fulltrúi, Miðvágur
Jørgen Niclasen, løgtingsmaður, Sørvágur
Jóanis Nielsen, lærari, Sandavágur

## Javnaðarlistin í Suðurstreymoy liðugur

UPPSTILLING

Fyrsti flokkur at almannakunngera listan í størsta valdøminum, Surðurstreymoy, er Javnaðarflokkurin.

Listin hjá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag sær annars soleiðis út:

Bergur P. Dam, skrivstovumaður, Varðagøta 53
Sophus Dal-Christiansen, søluráðgevi, Torfinsg. 32
Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinna, Villingardalsvegur 61
John Johannesen, tíðindamaður, Reyngøta 26
Elin Lindenskov, býráðslimur, Frúutrød 14
Kristian Magnussen, løgtingsmaður, Dungagø 13
Bjarki Mohr, starvsfólkaleiðari, Landavegur 72
Kári Mortensen, studentaskúlalærari, Áargeil 10
Helena Dam á Neystabø, leiðari, J. H. Schrøtersgøta 20
Jan Poulsen, løgreglumaður, Dánjalstrøð 13
Joan Ziskason, sjúkrasystir, Torkilsgøta 10

– Eg haldi, at hetta er ein spennandi listi. Her eru nógv nýggj nøvn – bæði roynd fólk og fólk, ið umboða breitt í samfelagnum, sigur Bjarki Mohr, sum er formaður í Suðurstreymoyar Javnaðarfelag.

– Talan var um eitt friðarval, har ikki varð atkvøtt, tí full semja var um tey 11, ið skulu bjóðast fram sum valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy, sigur Bjarki Mohr.

